Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

Í/F Advokatfelagið yvir við Strond
Yvir við Strond 4
FO-100 Tórshavn

Att: Petur Even Djurhuus, advokatur

**Tórshavn 7. mai 2012**

Journal nr.: 12/00060-6
Viðgjørt: S.R.

## Avgerð um yvirtøkuna hjá P/f Palla hjá Marionnu av partabrøvunumm í Sp/f Vesturskin

### 1. Samandráttur

Kappingareftirlitið fekk tann 12. apríl 2012 fráboðan um, at P/f Palli hjá Mariannu yvirtekur 33,667% av partabrøvunum hjá Sp/f Vesturskin. Fráboðanin var fullfíggjað tann 12. apríl. 2012.

Umsetningurin hjá pørtunum er omanfyri 4 mió. kr. hvør, og samlaði umsetningurin er omanfyri 75 mió. kr. Hetta merkir, at talan er um yvirtøku sum kemur undir fráboðanarskyldu sbrt. §16, stk. 1, og at samanleggingin skal leggjast fyri Kappingarráðið til støðutakan eftir §15, stk.1, sbrt. §14, stk. 2, nr. 3.

Kappingareftirlitið hevur saman við fráboðara umrøtt spurningin, um talan er um yvirtøku, sum er fevnd av fráboðanarskyldu, tí einans 33,667% av partabrøvunum verða yvirtikin. Kappingareftirlitið er komið til ta niðurstøðu, at ræðisbroyting fer fram í felagnum, og tí er talan um yvirtøku eftir Kappingarlógini. Niðurstøðan er partvíst grundað á tað, sum partarnir hava avtalað í smápartaeigarasáttmála og í keypssáttmálanum og at ávís onnur vinnulig sambond eru millum partarnar, sum gera at uppruna eigararnir ikki longur hava fult ræði á felagnum.

Luttakandi fyritøkurnar eru tvær fiskivinnufyritøkur, har onnur hevur virksemi innan uppisjóvarfiskiskap, meðan hin hevur virksemi innan botnfiskiskap. Talan er sostatt um tvær fyritøkur hvørs virksemi ikki umskarast.

Fiskivinnulóggávan regulerar, hvussu stór miðsavning kann verða í bæði fiskidagaskipanini og kvotaskipanini. Mest loyvda miðsavning er 20-35% innan einstøku bólkarnar, og er tí mest loyvda miðsavningin eftir fiskivinnulóggávuni á einum støði, sum eftir kappingarlógini vanliga ikki gevur orsøk til ivamál.

Kappingareftirlitið hevur kannað eftir, um tað eru atknýttar avmarkingar í hesi avtalu, sum Kappingarráðið eigur at taka støðu til. Kappingareftirlitið er ikki komið fram á tílíkar avmarkingar.

### 2. Avgerð

Grundað á tær upplýsingar sum Kappingarráðið hevur kunnleika til, verður ikki mett at yvirtøkan førir við sær, at virkna kappingin verður hindrað, við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist.

Kappingarráðið hevur tí avgjørt at góðkenna, uttan treytir, yvirtøkuna hjá P/f Palla hjá Marionnu av Sp/f Vesturskin.

Skálatrøð 20 · P.O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Faroe Islands · Tel +298 35 60 40 · Fax +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

**3. Inngangur**
Tann 12. apríl 2012 fekk Kappingareftirlitið fráboðan frá Peter Even Djurhuus, adv. um at P/f Palli hjá Marionnu (PHM) yvirtók 33,667% av partabrøvunum í Sp/f Vesturskin. Kappingareftirlitið boðaði tann 20. apríl 2012 fráboðara frá, at fráboðanin var fullfíggjað tann 12. apríl 2012.

Sambært §14, stk. 2, 3 pkt. í kappingarlógini skulu minst tvær fyritøkur í einari samanlegging hava 4. mió. kr. í umsetningi, áðrenn samanleggingin kemur undir fráboðanarskyldu. Samanleggingar, har samlaði umsetningurin hjá luttakandi fyritøkum, íroknað atknýttar fyritøkur, er omanfyri 75. mió. kr., skulu leggjast fyri Kappingarráðið, ið tekur støðu til, um samanleggingin hindrar virknari kapping, sbrt. §15, stk.1 í kappingarlógini.

Sambært teimum upplýsingum sum Kappingareftirlitið hevur móttikið frá felags umboðnum, er umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum hesin:

| PHM samtakið | Umsetningur í 1000 kr. |
|---|---|
| **P/f Palli hjá Mariannu** | [...] |
| **P/f Christian í Grótinum** | [...] |
| **P/f Hvalnes** | [...] |
| **P/f frá 5. juni 1992** | [...] |
| **Sp/f frá 27. juni 2007** | [...] |
| **Tilsamans** | [...] |

| Vesturskin samtakið | Umsetningur í 1000 kr. |
|---|---|
| **Sp/f Vesturskin** | [...] |
| **P/f Vesturleiki** | [...] |
| **P/f Nofa** | [...] |
| **P/f Brestir** | [...] |
| **Sp/f Brynhild** | [...] |
| **Tilsamans** | [...] |

Sostatt eru markvirðini fyri fráboðan, og markvirðini fyri nær ein samanlegging skal leggjast fyri Kappingarráðið nádd, sbrt. § 14, stk. 2, nr. 3 í kappingarlógini.

**2. Samanlegging**
Kappingareftirlitið og fráboðari hava áðrenn fráboðanin var formliga send inn umrøtt spurningin, um yvirtøkan hjá P/F Palla hjá Marionnu kemur undir samanleggingareftirlitið, tí einans 33,667 % av partabrøvunum verða yvirtikin. Kappingareftirlitið boðaði fráboðara frá, at tað vóru umstøður í hesum málið, sum gera, at talan er um eina yvirtøku, sum er fevnd av samanleggingareftirlitinum, tí ræði á felagnum broytist.

Ræði verður í §13, stk. 1, nr. 3 allýst sum møguleikin fyri at hava avgerandi ávirkan á raksturin hjá einari fyritøkuni. Tað er tískil óviðkomandi, hvørt avgerandi ávirkanin fer ella verður útint, men møguleikin fyri at útinna avgerandi ávirkan skal vera verulig. Í §13, stk. 1, nr. 3 verður eisini sagt, at ræði kann fást við støði í avtalum, rættindum ella á annan hátt, og at hesar einsamallar ella samanlagt geva møguleika fyri avgerandi ávirkan. Sostatt kann ræðið fáast, tí ein samanseting av rættindum, avtalum ella øðrum viðurskiftum føra við sær, at avgerandi ávirkan fæst á raksturin hjá einari fyritøku.

Í hesari yvirtøku eru fleiri viðurskifti sum tala fyri, at P/f Palli hjá Marionnu fær avgerandi ávirkan á raksturin hjá Sp/f Vesturskin.

Yvirtøkan av 33,667% av partapeninginum gevur í sær sjálvum ikki ræðið á felagnum, tí við hesum fær P/f Palli hjá Marionnu minnilutarættindi sambært galdandi vinnufelagslóggávu. Tað eru tó fleiri viðurskifti sum stuðla undir, at ræðisroyting yvir felagnum fer fram. Hesi eru:

1. Partarnir hava í smápartaeigarasáttmála avtalað, at partar sum eiga meira enn 30% av partapeninginum hava veto viðvíkjandi øllum øðrum enn dagliga rakstrinum av felagnum. Kappingareftirlitið metir, at henda áseting førir við sær, at ræðið yvir Sp/f Vesturskin fer frá einaræði til felagsræði.
2. Partarnir hava avtalað í smápartaeigaraavtalu, at nevndin verður skipað við 4 limum og P/f Palli hjá Marionnu fær formannin. Ongin áseting er um, at formaðurin hevur ta avgerandi atkvøðuna, um tað stendur á jøvnum. Hetta stuðlar undir at talan er um felagsræði. Henda skipan er tryggja fram til 2020 (sí næsta pkt.)
3. Partarnir hava avtalað, at P/f Palli hjá Marionnu skal veita Sp/f Vesturskin ábyrgdarlán á 4. mió. kr. og gjaldførislán á 4 mió. kr. Lánini verða útgoldin í ratum. Avtalan gongur fram til 2020 og kann bert í serligum førum uppsigast. Lánini verða veitt í sambandi við, at tveir djúpvatnstrolarar hjá samtakinum verða umbygdir til frystitrolarar. Eitt kreditor-debitor samband saman við øðrum vinnuligum bundinskapi, sum teimum omanfyri, stuðlar undir at talan er um felagsræði partanna millum.

Kappingareftirlitið metir, grundað á áðurnevndu viðurskifti, at ræðisbroyting er farin fram í Sp/f Vesturskin, við tað at ræði yvir felagnum ikki longur liggur einans hjá uppruna eigarunum, men er nú í felag við P/f Palla hjá Marionnu. Kappingarráðið hevur áður viðgjørt líknandi spurningar. Í málinum 11/00078 um yvirtøkuna hjá Klaksvíkar trolarafelag av M/s Stjørnuni, M/s Polarhav og 25% av Sp/f Tavuni, varð mett at ræði var fingið á Tavuni, tí onnur vinnulig sambond vóru millum keypara og Tavuna, sum gav keypara avgerandi ávirkan á raksturin hjá Tavuni.

**3. Partarnir**

**PHM samtakið**




P/f Palli hjá Marionnu eigur allan partapeningin í P/f frá 5. juni 1992, P/f Atlantic Pelagic Faroe og 50% í Sp/f frá 27. juni 2007. P/f frá 5. juni 1992 eigur dótturfeløgini P/f Hvalnes og P/f Christian í Grótinum, ið reka ávikavist M/s Norðborg og M/s Christian í Grótinum. Sp/f frá 27. juni 2007 eigur og útleigar kaiøkið í Ánunum. P/f Atlantic Pelagic Faroe hevur sum virksemi at selja uppisjóvarframleiðslu frá M/s Norðborg, og í minni mun frá øðrum.

**Talva 1: Lyklatøl fyri P/f Palla hjá Mariannu samtakið**

| tkr. | 2010 | 2009 | 2008 | 207 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|
| Bruttovinningur | 155.195 | 58.527 | 126.137 | 100.221 | 108.975 |
| Ársúrslit | 42.773 | 1.240 | 44.682 | 37.422 | 32.442 |
| Eginogn | 187.616 | 144.843 | 143.604 | 98.923 | 61.498 |
| Fíggjarjavni | 530.250 | 485.352 | 444.132 | 419.318 | 286.033 |

Fiskivinnuvirksemi hjá PHM samtakinum er innan uppisjóvarfiskiskap. Í talvu 2 síggjast kvoturnar, sum samtakið fekk tillutað í 2011. Parturin hjá samtakinum í mun til samlaðu kvoturnar hevur ligið millum 20 % og 31%.

**Talva 2: Kvotur í 2011 (tons)**

| Fiskiloyvi – Kvotur (2011) | M/s Norðborg | M/s Chr. í Grótinum | Samlað kvota | %-partur av samlaðu kvotu |
|---|---|---|---|---|
| Svartkjaftur(egin kvota) | 2.888 | 1 | 14.627 | 19,8% |
| Norðhavssild(egin kvota) | 14.622 | 1 | 47.981 | 30,5% |
| Heystgýtandi sild (egin kvota) | 1.000 | 1.000 | 10.000 | 10,0% |
| Lodna (egin kvota) | 4.875 | 0 | 19.500 | 25,0% |
| Makrelur (egin kvota uttan avgjald) | 9.896 | 8 | 35.000 | 28,3% |
| Makrelur (egin kvota við avgjaldi) | 6.106 | 0 | 22.000 | 27,8% |
| Makrelur (royndarkvota) | 400 | 400 | 2.800 | 28,6% |
| Makrelur (felagskvota) | 0 | 0 | 41.450 | 0% |

**Vesturskin samtakið**




Sp/f Vesturskin eigur 100% av partapeninginum í P/f Brestir, 59% av partapeninginum í P/f Nofa og 99% av partapeninginum í 59% í P/f Brynhild. P/f Brestir og P/f Nofa reka ávíkavist trolararnar M/t Brestir, M/t Vesturvarði og M/t Vesturskin, sum koma undir bólk 2 eftir § 28, stk. 1 í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Sp/f Vesturskin er frítikið, sbrt. § 110 í ársroknskaparlógini, frá at gera samtaksroknskap og tí er ikki møguligt at gera yvirlit yvir lyklatøl fyri hesa samtøku.

Fiskivinnuvirksemi hjá Sp/f Vesturskin er innan botnfiskiskap. Í talvu 2 síggjast fiskidagarnir, sum samtakið fekk tillutað í 2011. Parturin hjá samtakinum í mun til samlaða talið av fiskidøgum hevur ligið millum 6 – 22%. Samtakið eigur útróðrarbátin Brynhild, sum kemur undir bólkin, sum hevur felagsfiskidagar. Tí eru ongar upplýsingar um fiskidagar hjá Brynhild.

Talva 3: Fiskidagar í 2010/11

| Fiskiloyvi – dagar (2010/11) | Vesturleiki | Brestir | Brynhild | Vesturskin | Vesturvarði | Samlað tal av døgum | % av døgum |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiskidagar (bólkur 1) - innara leið | 117,4 | 75,8 | | | | 900 | 21,5% |
| Fiskidagar (bólkur 1) - ytra leið | 163,6 | 120,5 | | | | 1.700 | 16,7% |
| Fiskidagar (bólkur 2) - egnir dagar | | | | 137,36 | 137,36 | 4.247 | 6,5% |
| Fiskidagar (bólkur 5B) - felagsdagar | | | X | | | 5.304 | |

**4. Avtalugrundarlagið**
Kappingareftirlitið hevur gjøgnumgingið keypssáttmála, viðtøkur og smápartasáttmála. Kappingareftirlitið er ikki komið fram á nakra atknýtta avmarking, sum Kappingarráðið skal taka støðu til.

Partarnir hava sínámillum avtala, at P/f Palli hjá Marionnu yvirtekur 33,667% av partapeninginum í Sp/f Vesturskin og letur Sp/f Vesturskin tvey lán á 4 mió. kr. til umbygging av tveimum trolarum. Lánini ganga fram til 2020, og í hesum tíðarskeiði hava partarnir avtala at líka umboðan skal vera í nevndini hjá Sp/f Vesturskin, og at eigarar, sum eiga meira enn 30% av partapeninginum, kunnu seta fram veto.

**4.1. Keypsavtalan v.m.**
Partarnir hava avtalað, at seljarin partvíst selur og partvíst teknar nýggjan innskotspening til avhendan til keypara soleiðis, at keyparin kemur at eiga 33,667% av partapeninginum í Sp/f Vesturskin. Sølan er treytað av, at keyparin veitur keypta felagnum lán á 8. mió. kr.

Keypið er treytað av góðkenning frá kappingar- og fiskivinnumyndugleikunum.

*Avtala um gjaldførislán*
Partarnir hava avtalað, at P/f Palli hjá Marionnu veitir eitt gjaldførislán til Sp/f Vesturskin, sum verður útgoldið í fleiri gjøldum alt eftir tørvinum hjá Sp/f Vesturskin. Útgjald verða latin fram til 2015; eftir hetta tíðarskeiðið skal Sp/f Vesturskin gjalda láni aftur yvir eitt 5 ára skeið.

So leingi sum skuld er partanna millum, skal Sp/f Vesturskin kvartalsárliga lata roknskap til P/f Palla hjá Marionnu. P/f Palli hjá Marionnu kann siga upp avtaluna um gjaldførislán við 7 daga freist, um:

1. eitt av gjøldunum ikki verður goldið rættstundis,
2. um Sp/f Vesturskin verður fyri einstaklinga rættarsókn,

3. um Sp/f Vesturskin steðgar gjaldingum sínum,
4. um Sp/f Vesturskin byrjar samráðingar um skuldarsemju,
5. um Sp/f Vesturskin verður fyri trotabúsviðgerð.

*Avtala um ábyrgdarlán*
Partarnir eru blivnir samdir um, at P/f Palli hjá Marionnu skal veita Sp/f Vesturskin eitt ábyrgdarlán upp til 4. mió. kr., ið er eyðmerkt til møguliga fígging av umbygging av M/s Brestir og M/s Vesturleika. Láni verður útgoldið eftir tørvi í ratum. Útgjøldini verða latin eftir tørvi, men evsti dagur fyri at fáa útgjald er tann 31. desembur 2013. Afturgjaldingin byrjar primo 2016 og fer fram yvir eitt 5 ára tíðarskeið.

Ásetingar eru um, at afturgjald kann bara fara fram um raksturin hjá Sp/f Vesturskin loyvir hesum, og Sp/f Vesturskin kann ikki útluta vinningsbýti, uttan so at øll gjaldkomin renta og avdráttir eru goldnir fyrst. Skuldin ísmb. við ábyrgdarláni verður eftirstillað allari vanligari skuld.

Sp/f Vesturskin skal kvartalsárliga lata roknskap til P/f Palla hjá Marionnu so leingi sum skuld er millum partarnar.

**4.2. Smápartaeigarasáttmálin og viðtøkur**
Í viðtøkunum eru ásetingar um forkeypsrætt, um so er at smápartar ynskjast avhendir. Forkeypsrætturin er avmarkaður til brøk, roknaður sum smápartapeningurin hjá tí sum hevur rættin í mun til samlaða smápartapening felagsins. Verður ein forkeypsrættur ikki nýttur, økist brøkurin hjá hinum tilsvarandi.

Førir ein avhendan av smápørtum til at ein einstaklingur fær meirilutan av smápartapeninginum, skulu allir aðrir partar kunna selja til somu treytir.

Ásetingar um aðalfund og nevnd eru ásettar í smápartaeigarasáttmála, sum lutvíst seta samsvarandi ásetingar í viðtøkunum úr gildi í tíðarskeiðinum, meðan lánsavtalurnar eru galdandi. Partarnir binda seg og sínar nevndarlimir til at atkvøða í tráð við teirri felags ætlan.

So leingi sum skuldar- og ognarviðurskifti eru millum partarnar, skal nevndin skipa seg við 4 persónum, har P/f Palli hjá Marionnu skal hava 2 limir, og formaðurin skal veljast beinleiðis á aðalfundinum. Nevndin tekur avgerðir við vanligum meiriluta, uttan so at lóggáva fyriskrivar nakað annað.

Partar sum umboða minst 30% av smápartapeninginum, hava veto saman viðvíkjandi øllum avgerðum uttan teimum, sum viðvíkja dagliga rakstrinum av felagnum.

**5. Regulering**

**5.1. Veiðurættindi**
Høvuðslógin innan fiskivinnu er løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap við seinni broytingum[1]. Áðrenn 1994 var frítt at fiska hjá føroyskum fiskiførum í føroyskum sjóøki, men við lógini vórðu kvotur ásettar. Hetta varð broytt í 1996, tí mett var, at ein skipan við fiskidøgum til fiskiskap eftir botnfiski egnaði seg betur enn kvotur. Við eini skipan við fiskidøgum slapst undan, at veiða varð tveitt útaftur. Í dag er fiskidagaskipanin galdandi fyri fiskiskap eftir botnfiski, meðan kvotuskipanin er galdandi fyri veiðu eftir uppsjóvarfiski í føroyskum sjóøkið. Á landsleiðum uttan fyri Føroyar, har Føroyar eiga veiðurættindi, eru kvotuskipanir galdandi. Lógin um vinnuligan fiskiskap er galdandi fyri føroyska sjóøki og øll økir, har Føroyar eiga fiskivinnurættindi.
Endamálið við lógini um vinnuligan fiskiskap framgongur av §2:

*§ 2. Livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar, eru ogn*

[1] Løgtingslóg nr. 28 frá 10. Mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, sum seinast broytt við Ll. Nr. 87 frá 18 august 2010

*Føroya fólks. Dentur verður lagdur á, í umsitingini av hesi lóg, at varðveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt á skilabesta hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga við virðing fyri sambandinum millum ymisku dýra- og plantustovnarnar í havinum og meingi teirra til tess at tryggja besta samfelagsbúskaparliga íkastið frá fiskivinnuni, støðugar arbeiðs- og inntøkumøguleikar og møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið.*

Endamálsorðingin leggur upp til eina fulldygga samfelagsliga tilfeingisnýtslu, men tað eru eisini onnur samfelagslig atlit. Sambært § 2 skal tilfeingi umsitast soleiðis, at tað tryggjar ein støðugan arbeiðsmarknað og útjaðaramenning.

Fyri at reka vinnuligan fiskiskap í føroyskum sjóøki ella at tróta tey veiðurættindi, sum føroyska heimastýri eigur aðrastaðni, er fyrsta kravið, at fiskifarið hevur eitt veiðuloyvi frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, sbrt. §5, stk. 32. Við loyvinum hevur fiskifarið fingið góðkenning til at reka vinnuligan fiskiskap, men hetta gevur ikki rættindi til veiðu av fiskastovni.

Fiskiloyvir er ein rættur, sum verður latin eigara av fiskifari, ið hevur fingið áðurnevnda veiðiloyvi at veiða í eitt ávíst fiskidagatal og/ella ávísa nøgd av ávísum fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári, sbrt. §5, stk. 4.

Einstøku fiskiførini verða flokkaði í ein av seks bólkum. Hesir eru sambært §28, stk. 1:

- Bólkur 1: Trolarar yvir 400 HK, lemmatrolarar
- Bólkur 2: Trolarar yvir 400 HK, pør
- Bólkur 3: Línuskip yvir 110 tons
- Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 15 tons
- Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 tons á húkaveiðu
- Bólkur 6: Onnur veiða

Fyri botnfisk er fiskidagaskipanin galdandi í føroyskum sjóøki, har einstøku bólkarnir av fiskiførum fáa tillutað eitt samlað fiskidagatal ístaðin fyri eina felagskvotu, sbrt. §29, stk. 1.

Fiskidagatalið verður ásett við lóg á hvørjum ári, sbrt. §22 í lógini um vinnuligan fiskiskap. Í hesum sambandi letur Havstovan landsstýrismanninum stovnsmetingar, tilmæli um fiskidagar komandi fiskiárið og hvussu fiskiskapurin skal skipast tað komandi fiskiárið. Fiskidaganevndin letur somuleiðis eitt tilmæli um fiskidagar fyri komandi fiskiárið, og hvussu fiskiskapurin skal skipast tað komandi fiskiárið. Broytingar í fiskidagatalinum skulu m.a. vera grundaðar á metingar um, hvat fiskidagatal fyri hvønn høvuðsbólk av fiskiførum best tryggjar, at fiskastovnarnir verða gagnnýttir burðardygt.

Fiskiskapur eftir uppsjóvarfiski í føroyskum øki og økjum, har Føroyar eiga veiðurættindi, verður reguleraður við kvotum. Her verða ásettar felagskvotur fyri einstøku skipabólkarnar, sum síðan kunnu verða býttar út á hvørt fiskifarið sum eginkvota ella felagskvota við hámarki.

Fyri fiskiskap eftir gulllaksi er tað serliga galdandi, at ásett er felagskvota uttan hámark. Hetta merkir, at fiskiførini fáa eitt fiskiloyvi har ásett er, at tey kunnu fiska óavmarkaða nøgd av gulllaksi í eitt ár. Reglurnar um gulllaksin eru at finna í kunngerð nr. 13 frá 18. januar 1993 um fiskiskap eftir gulllaksi á ytru landleiðini. Í kunngerðini verður sagt, at endamálið við hesum fiskiloyvi er at minka um beinleiðis veiðuna eftir upsa. Sambært kunngerðini verður tað loyvt í mesta lagi 6 partrolarum av verandi flota at fiska eftir gulllaksi árliga.

## 5.2. Ognarskapur í fiskivinnuni

[2] Útróðrarbátar undir 15 tons nýtast ikki veiðuloyvi

Ásetingar eru, sum avmarka útlendskan ognarskap í føroysku fiskivinnuni. Tað er forboð ímóti, at fysiskir persónar búsitandi uttan fyri Føroyar eiga fiskifør við veiðuloyvi. §7, stk. 2 ásetur nevniliga, at fysiskir persónar, sum eiga eitt fiskifar og ynskja at fáa eitt veiðiloyvi, skulu hava verið skrásettir í føroyska fólkayvirlitinum seinastu tvey árini og skulu vera fult skattskyldugir í Føroyum.

Sambært §7, stk. 3 skulu løgfrøðiligir persónar, sum eiga fiskifør og ynskja at fáa eitt veiðiloyvi, lúka 3 treytir:

1. Felagið skal vera partafelag, smápartafelag, lutafelag ella partsreiðarí og skal hava fast tilknýti til Føroyar. Er talan um partafelag ella smápartafelag, skulu partabrøvini vera navnapartabrøv.
2. Eigararnir av í minsta lagi 2/3 av eginpeninginum, herundir partapeninginum, umframt ábyrgdarpeninginum, sum somuleiðis eiga í minsta lagi 2/3 av atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, skulu lúka treytirnar í stk. 2. Føroyska nevndarumboðanin skal í minsta lagi vera 2/3 av nevndini og lúka treytirnar í stk. 2. Skal felagið luta út vinningsbýti, skal føroyski parturin í minsta lagi fáa útlutað 2/3.
3. Eiga útlendingar í fiskifari, heimahoyrandi í Føroyum, skal hetta góðkennast av landsstýrismanninum. Fara broytingar fram í ognarviðurskiftunum, herundir partapeninginum umframt ábyrgdarpeninginum, atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, skal hetta fráboðast landsstýrismanninum, áðrenn broytingarnar fara fram, og landsstýrismaðurin skal góðkenna slíkar broytingar. Broytast ognarviðurskiftini soleiðis, at lutfallið 1/3 og 2/3 broytist, og útlendski parturin harvið gerst størri enn 1/3, fellur veiðiloyvið burtur.

Endamálið við ásetingunum í §7, stk. 2 & 3 er at tryggja, at føroysk veiðurættindi ikki koma á útlendskar hendur. Hetta er eitt nationalt atlit, men í kappingarligum høpi er talan um avmarking av atgongd til eina vinnu.

Ásetingar eru eisini í lógini um vinnuligan fiskiskap, sum hava til endamáls at virka ímóti, at øll veiðurættindi enda á fáum hondum. §7a ásetur, at fysiskur ella løgfrøðiligur persónur, sum rekur vinnuligan fiskiskap sambært hesi lóg, einsamallur ella saman við nærstandandi, beinleiðis ella óbeinleiðis, einans kann eiga ein avmarkaðan part av veiðuloyvunum. Lógarásetta ognarlutfallið liggur millum 20-35% alt eftir, hvør skipabólkur talan er um.

### 5.3. Umsetilig veiðuloyvi

Somuleiðis eru fleiri ásetingar, ið avmarka flyting av veiðuloyvum millum fiskifør. Sambært §8 kann veiðuloyvi einans flytast til annað fiskifar, um hetta hevur somu ella minni fiskiorku. Veiðuloyvi kunnu flytast til fiskifør, sum longu hava veiðiloyvi, men tó einans innanfyri somu skipabólkar. Alt, sum hevur við flyting av veiðiloyvi at gera, fer fram við umsókn til landstýrismannin í fiskivinnumálum, sum skal góðkenna allar flytingar. Landstýrismaðurin hevur heimildir til at gera undantøk frá reglunum.

Fiskiloyvi kunnu undir ávísum treytum flytast millum skip við veiðuloyvi. Hesi kunnu í ávísan mun flytast millum skipabólkar, men forðingar eru. T.d. er tað ein meginregla, at fiskiloyvi ikki kunnu flytast millum skipabólk 1 og 5, sbrt. §3, stk. 2 í kunngerð nr. 3 frá 12. januar 2011 um avhending av fiskidøgum. Somuleiðis er ikki loyvt at flyta fiskiloyvi millum húk og trol í skipabólki 4, sbrt. §3, stk. 3, óansæð um hetta fer fram umvegis aðrar skipabólkar, sbrt. §3, stk. 4. Heimild er latin landstýrsimanninum at nágreina í kunngerð, hvussu flyting av fiskiloyvum kann fara fram, og í dag er eitt stórt tal av kunngerðum, sum nágreina hetta.

Út frá einum kappingarligum sjónarmiði kann staðfestast, at mobiliteturin á marknaðinum fyri veiðuloyvi og fiskiloyvi er avmarkaður av galdandi lóggávu, men er til staðar í ávísan mun.

Tá tað kemur til avreiðing, eru reglurnar soleiðis, at øll botnfiskaveiða, sum er veidd í føroyskum og/ella íslendskum øki, skal avreiðast um eina góðkenda innvigingarskipan í Føroyum, sbrt. §2 í kunngerð nr. 95 frá 27. juni 2005 um treytir fyri avreiðing í Føroyum og uttanlands, sum seinni broytt við kunngerð nr. 114 frá 13. desember 2010.

Sambært §2, stk. 2 skal fyrsta søla av veiðini altíð fara fram í Føroyum. Undantak er tó frá meginregluni, tí sambært §4, stk. 1 er loyvt at avreiða 25% av veiðuni uttanlands. Hetta merkir at 75% av fyrstu søluni fer fram í Føroyum.

Um veiðan verður flutt óvirkað av landinum, skal útflytarin skjalprógva yvirfyri TAKS, at hann seinastu 7 dagarnar hevur keypt veiðuna á einari góðkendari uppboðssølu, sbrt. § 3. Einans fiskifar, við fiskiloyvi sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, kann bjóða fisk til sølu um eina góðkenda uppboðssølu, sbrt. §2, stk. 3.

Hetta merkir, at veiðan skal antin tilvirkast her á landi, ella skal 75% av veiðuni seljast á einari góðkendari uppboðssølu.

Ásetingarnar um innvigingarskipan og útflutning av óvirkaðari veiðu eru ikki galdandi fyri uppsjóvarfisk, men eru galdandi fyri gulllaksafiskiskap, sbrt. §1 stk. 1-3 í kunngerð nr. 95 frá 27. juni 2005 um treytir fyri avreiðing í Føroyum og uttanlands við seinni broytingum.

## 6. Marknaður

P/f Palli hjá Marionnu selur tilvirkaðar fiskavørur á altjóða marknaðinum, og nakað av rávøruni verður seld á føroyska marknaðinum. Sølan av rávøru hjá P/f PHM samtakinum nýtist ikki at verða seld umvegis góðkenda føroyska uppboðssølu ella umvegis góðkenda útlendska havn, tí talan er um fiskasløg, sum eru undantikin reglunum í §1, stk. 1 í kunngerð nr. 95 frá 27. juni 2005.

Veitarin upplýsir, at einans 5-10% verða seld á føroyska marknaðinum. Fráboðari upplýsir, at 5 av størstu kundunum eru uttanfyri Føroyar. Teir størstu keypararnir í Føroyum eru Kollafjord Pelagic, Havsbrún, Agnasølan og Kambur.

Skal ítøkilig skilmarking av viðkomandi marknaði gerast yvir teir marknaðir, sum PHM samtakið virkar á, er neyðugt at viðkomandi marknaður verður skilmarkaður fyri hvørt einstakt fiskaslag, tí hvørt einstakt fiskaslag hevur keyparar, sum ikki kunnu varaseta (substituera) frá ávísa fiskaslagnum. Hinvegin eru uttan iva eisini keyparar, sum í stóran mun kunnu varaseta (substituera) millum einstøku sløgini av uppisjóvarfiski. Her heima er t.d. P/f Havsbrún, sum kann virka sínar vørur úr flest øllum uppisjóvarfiski.

Í hesum tilmæli hevur Kappingareftirlitið valt tann leistin, at skilmarka viðkomandi marknaðirnar sum ávíkavist altjóða marknaðin fyri tilvirkaðar fiskavørur úr uppisjóvarfiski og føroyska marknaðin fyri rávøru úr uppisjóvarfiski.

Sp/f Vesturskin samtakið hevur virksemi á føroyska ráfiskamarknaðinum. Av tí at talan er um botnfiskasløg, er veiðan fevnd av §1, stk. 1 í kunngerð nr. 95 frá 27. juni 2005. Hetta merkir, at tann rávøran sum ikki fer til innanhýsis framleiðslu skal umvegis eina føroyska uppboðssølu. Útbjóðarar á føroyska rávøru marknaðinum fyri botnfisk eru øll feløg sum eiga skip ella bátar, sum hava veiðuloyvi til botnfiskiskap í føroyskum sjóøkið og í øðrum sjóøkjum, har Føroyar hava veiðurættindi. Avtakarar á hesum marknaði eru teir keyparar, sum keypa rávøru á Fiskamarknaði Føroya til føroyska ella útlendska framleiðslu.

Kappingareftirlitið hevur tí valt at skilmarka viðkomandi marknað sum marknaðurin fyri rávøru úr botnfiski, sum verður seld á einari føroyskari uppboðssølu. Tann veiðan sum fer til innanhýsis framleiðslu, er ikki partur av viðkomandi marknaði.

## 7. Meting

### 7.1. Skilmarking av viðkomandi marknaði sambært kappingarlógini

Sambært §5, stk. 1 í kappingarlógini skal skilmarkingin av viðkomandi marknaði fara fram við varaseting av eftirspurningi og útboði. Ásetingin hevur tó ikki við sær, at tað ikki ber til at brúka onnur

metingarstøði enn tey nevndu. Endamálið við at skilmarka marknaðir er at gera greitt, hvørjar kappingaravmarkingar eru, eitt nú um viðskiftafólkini hava aðrar møguleikar fyri veitingum av vørum og tænastum eisini landafrøðiliga.

Ein ávísur vørumarknaður skal skiljast sum allar tær vørur, sum brúkarin metir kunnu varasetast fyri hvørja aðra, orsaka av eginleikunum hjá vørunum, prísi ella nýtslu.

Landafrøðiliga skilmarkingin skal avmarka tað økið, har luttakandi fyritøkurnar selja og keypa vørur og tænastur, sum hava so mikið eins kappingarumstøður, og sum kunnu skiljast frá grannaøkjum, av tí at kappingarumstøðurnar har eru munandi øðrvísi.

Tá varaseting av eftirspurningi verður kannað, verður hugt at hvørjar vørur brúkarin metir kunnu varasetast fyri ávísu vøruna, sum luttakandi fyritøkur selja ella keypa. Sostatt verður kannað, hvussu brúkarin ber seg at, um lutfalsligi prísurin økist á ávísu vøruni. Hvørjar vørur vil brúkarin skifta yvir til. Tær vørur, sum brúkarin vil skifta til, eru at finna á sama marknaði sum ávísa vøran.

Tá varaseting av útboði verður kannað, verður mett um hvørjir aðrir veitarar kunnu, sum svar uppá smáar varandi prísbroytingar á ávísu vøruni innan stutt tíðarbil og vanliga í mesta lagi 1 ár[3], umstilla framleiðslu og sølu uttan týðandi meirkostnað og váða til vørur sum kunnu varasetast fyri ávísu vøruna.

Um tað eftir varaseting av eftirspurningi og útboði eru ivamál um kappingarligu støðuna á marknaðinum, skal møgulig kapping kannast. Her verður kannað í hvønn mun fyritøkur yvir eitt longri tíðarbil hava møguleika at fáa atgongd til marknaðin, har ávísa vøran er at finna.

Tað serliga í hesum málið er, at lógin um vinnuligan fiskiskap og kunngerðir við heimild í henni áseta, hvør kann selja veiðu, og hvar hon kann seljast. Hetta hevur stóra ávirkan á skilmarkingina av viðkomandi marknaði.

Viðvíkjandi varaseting av eftirspurninginum hevur lóggávan ikki stórvegis ávirkan, men tað er greitt, at 75/25% marki fyri avreiðingum ger, at um prísurin er kappingarførur, so vilja føroysk fiskifør í minni mun avreiða í útlendskum havnum. Her fer sostatt ein ávís varaseting fram av eftirspurninginum. Hetta er ikki galdandi, um prísurin ikki er kappingarførur, tí brúkarar í útlendskari havn fáa ikki fatur á meir enn 25% av tí veiðu, sum føroysk fiskiskip veiða og selja ótilvirkað.

Viðvíkjandi varaseting av útboði hevur lóggávan heldur størri ávirkan á, hvussu skilmarkingin av viðkomandi marknaði kann fara fram. Lógin um vinnuligan fiskiskap setur skott millum hvønn skipabólk, og hetta merkir, at flytiføri[4] millum skipabólkar er lítið og einki. Ein ávíst flytiføri er loyvt eftir umsókn og góðkenning frá landsstýrismanninum, men stórar avmarkingar eru í flytiførinum. T.d. kann fiskiloyvi ikki flytast millum húk og trol. Hetta merkir, at um prísurin á einum fiskaslagi økist, er tað ikki sannlíkt, at fiskifør í øðrum skipabólkum innan stutt tíðarbil kunnu umstilla sín fiskiskap til hetta fiskaslag. Kvotur og fiskidagar eru í ávísan mun umsetilig rættindi, men sum meginregla einans innanfyri egnan skipabólk. Tískil kann ikki væntast nøkur serlig útboðsvaraseting á rávøru marknaðinum.

### 7.2. Marknaðarráðandi støða

Orsaka av at skott eru millum teir einstøku skipabólkarnir, og at ásetingar eru um mest loyvdu miðsavning, sum liggur millum 20-35%, alt eftir hvør skipabólkur talan er um, metir Kappingareftirlitið ikki, at tað er nøkur orsøk at halda, at yvirtøkan hjá P/f Palla hjá Marionnu av Sp/f Vesturskin kann viðføra ov stórt marknaðarvald við yvirtøkuni. Vanliga verða miðsavningar millum 20-35% ikki mettar at geva orsøk til at halda, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist. Kappingareftirlitið er ikki komið fram á viðurskifti, sum saman við fyrrnevndu miðsavning kunnu føra til, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist.

[3] Levinsen(2009;216)
[4] Mobilitur

Talan er um eina ráðandi støðu, tá ein fyritøka hevur eina so ráðandi búskaparliga støðu, at fyritøkan hevur møguleika at forða fyri munagóðari kapping á umrødda marknaðinum, av tí at nevnda støða gevur fyritøkuni møguleika fyri óheftum atburði mótvegis kappingarneytum, viðskiftafólki og í síðstu atløgu brúkarunum.

Kappingareftirlitið metir ikki, at yvirtøkan førir við sær, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist. Lóggávan á økinum avmarkar, hvussu nógv veiðuloyvi kunnu ognast – mest loyvdi ognarpartur liggur niðanfyri tað, sum í kappingarligum høpi vanliga verður mett at geva høvi til at halda, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist.

Sjálv sølan er eisini regulerað soleiðis, at 75% av allari sølu av veiðu skal umvegis eina føroyska uppboðssølu, meðan 25% kann avreiðast í einari góðkendari útlendskari havn. Kappingareftirlitið metir ikki, at ein seljari á einari uppboðssølu kann hava óheftan atburð mótvegis kappingarneytum ella keyparum. Á einastu uppboðssølu í Føroyum, Fiskamarknaði Føroya á Toftum, eru treytirnar soleiðis, at allar vanligar handilstreytir uttan prísurin eru staðfestar av uppboðssøluni so sum góðska og gjalding. Prísurin verður avtalaður millum keypara og seljara, men uppboðssølan almannakunngerð ikki søguligar prísir. Kappingareftirlitið metir, at uppboðssøluformurin í sær sjálvum er ein handilsmarknaður, sum vanliga virkar á ein fulldyggan hátt.

Umstøðurnar á seljara- og keyparasíðuni kunnu tó gera, at fyrimunurin við einari uppboðssølu minkar, um t.d. talið av seljarum ella keyparum er lítið, ber til í ávísan mun at nýta marknaðarvald. Her er tó vert at leggja til merkis ásetingarnar um, at 75% av veiðuni, sum ikki verður tilvirkað, skal seljast í Føroyum. Hetta avmarkar møguleikan hjá seljarum at ávirka prísin á uppboðssøluni á ein óveruligan hátt. Hinvegin er tað óheppið, at fáir keyparar eru, og at upplýsingar um søguligar prísir ikki eru almennir.

Kappingareftirlitið metir, at yvirtøkan lítla ella onga ávirkan fær á kappingina, tí talan er um tvey samtøk, sum hava virksemi innan ymiska fiskivinnu. P/f Palli hjá MariOnnu hevur virksemi innan uppisjóvarfiskiskap, meðan Sp/f Vesturskin hevur virksemi innan botnfiskiskap.

## 8. Niðurstøða

Grundað á tær upplýsingar sum Kappingarráðið hevur kunnleika til, verður ikki mett at yvirtøkan førir við sær, at virkna kappingin verður hindrað, við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist.

Kappingarráðið hevur tí avgjørt at góðkenna, uttan treytir, yvirtøkuna hjá P/f Palla hjá Marionnu av Sp/f Vesturskin.

Vegna Kappingarráðið

Ingunn Ó. Eiriksdóttir
Forkvinna

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri